Góðu pisur – tilreiðar at flúgva frælsar út at finna fagra flog tykkara – hjartaliga tillukku.

Hugsi, at kenslurnar helst eru eins ymiskar og tit eru. Fleiri hava glett seg í trý ár at gerast pisur, onnur hava stilla sinnið í sjálvari tilgongdini, og nøkur tykkara hava kanska av og á spurt tykkum sjálvi, um hetta nakrantíð fór at bera á mál.

Og mín sann! Væl arbeitt, strítt og kempað! Nú standa tit her, endiliga fyri summi og longu fyri onnur.

Uttan mun til litríka kensluspælið, so er hetta tykkara løta at njóta. Pisufundur á Gøtusandi.

Foreldur, ommur og abbar, systkin, familja, skúlaleiðsla, lærarar og starvsfólk, vinir og øll tit, sum á onkran hátt eiga lut í tilgongdini og gleðini hjá prúðu pisum okkara á sandinum í dag – hjartaliga tillukku!

***

Eitt farvæl merkir broytingar. Vit leggja tað, sum er, aftur um okkum, og er gerst til var.

Løturnar í bussi ella bili eftir vegnum inn í dalin eru farnar. Nøkur tykkara hava helst onkran myrkan vetrarmorgun seinastu árini eydnusom ballað tykkum aftur í heitu songina, tí ilsliga veðrið gjørdi farleiðina og lívið í dalinum ótrygt. Tað er nú søga.

Góðu løturnar við kjaki og fakligum dugna í tímunum, vesivitjanin, sum gjørdist til í so langa prátið úti á gongini, festligu fríløturnar, og tá ið tit møttu nýggjum vinum. Hesar løturnar verða nú var.

Leggið nú eisini seinastu dagarnir aftur um tykkum, tá ið lærarar aftur og aftur hava sagt: *Tú hevur fingið…* og so ert tú líkasum eitt tal. Og onnur spyrja: *Hvat fekst tú?*

Minst til, at einki menniskja er eitt tal ella ein frágreiðing. Tit eru so nógvar ferðir meira verd, og blandið ongantíð sjálvt lívið og menniskjaliga virði tykkara við tøl ella skjøl.

***

Góðu pisur! Tit fáa í dag, eins og fuglaungar, eitt vinarligt skump úr reiðrinum, og veingir tykkara fara í fría fallinum at møta luftstreymum, sum bæði gera tykkum før fyri at flúgva og eisini fara at gera tykkum ótrygg.

Tað eru jú tit, sum nú skulu flúgva.

Samstundis, sum tit leggja tykkum eina við sjálvi at finna tykkara flog, minst so eisini til, at ongin megnar at flúgva langt í einsemi.

Hyggið ofta kring tykkum, um ikki onkur er, sum tit kunnu ferðast saman við, og heilt sikkurt er eisini onkur, sum tørvar tykkara hjálp og stuðul á ferðini.

Onkuntíð fara tit helst eisini at uppliva at missa flogið. Hetta er bara ein partur av lívinum. Tað er tá, tit læra, serliga við aftur at stríðast fyri at finna rætta flogið.

Hugsi tó altíð, at hetta, sum eg nú upplivi, hava onnur eisini upplivað.

Tit eru serstøk, men ikki so serstøk.

Minst til, at fagra flogið finna tit í skiftandi luftstreymunum, ið binda saman gleði og sorg, meining og líðing, felagsskap og vónbrot, og í við- og mótvindi, har tit taka ábyrgd.

***

Persónliga flogferð okkara veldst í stóran mun um dirvi at bjóða skiftandi lívsvindunum av, eins og at vit verða hjálpt á leið, tá ið flogið gerst avbjóðandi.

*Eg eri Malala* er bókin um ungu pakistansku gentuna Malala Yousafzai. Í endanum av bókini sigur hon: *Eg veit,… at Gud hevur givið mær eina ábyrgd og eina gávu: eg havi ábyrgd at gera verðina til eitt friðaligari stað, og tað beri eg við mær hvørja løtu á degnum; og gávan er at vera før fyri hesum. Friður í hvørjum heimi, hvørjari gøtu, hvørjum býi, hvørjum landi – tað er dreymurin… Eg eri Malala. Mín verð er broytt, men ikki eg.*

Og soleiðis er tað. Verð hennara broyttist, tá ið hon ein vanliga dag, á veg heim við bussinum, var skotin beint í andlitið av yvirgangsmonnum. Hon fekk tó gávuna, sum lívið er, aftur og valdi at halda fast við tað, hon trúði. Hon gjørdist seinni tann yngsta, sum hevur vunnið Friðarheiðursløn Nobels.

Ferð hennara er ógvuslig og her skal ikki samanberast. Men tað er ein sannroynd, at tykkara ferð broytist, men minst til, at tit eru tey somu.

Við Malalu gerst ynskið um eitt gott lív og ein vakran heim samstundis eitt ynski um, at onnur fáa tað gott við møguleika fyri útbúgving í frælsi og rættvísi við hjálp.

***

Tað er, eins og hjá Malalu, tín ábyrgd at velja farleið. Tú hevur fingið títt lív at liva, og vit kunnu bara staðfesta, at finna rætta flogið ikki altíð er bara bara.

Men gæsnar, sum flúgva í V-skapi, kunnu ráðgeva okkum.

Tær vita, at tað er saman, at flogið gerst vakrari, longri og lættari. Fyri hvørt veingjaslag geva tær hvørjari aðrari uppdrift.

Eisini vilja fólk vera við, at um onkur gásin villist, vita tær, at tað krevur ov nógv at flúgva í einsemi, so tá fara tær at leita og stuðla síðani hvørji aðrari.

Um ein teirra gerst lúgvað, koma aðrar at bíða saman við henni, til hon aftur er før fyri at flúgva. Síðani flúgva tær víðari í felagsskapi.

Tær vita eisini, at tann, ið flýgur fremst, ongan ágóða fær av uppdriftini frá hinum. Tí skiftast tær at um at leiða. Tær hava jú ikki bara ábyrgd fyri sær sjálvari, men eisini fyri hinum.

Tær larma, tær samskifta og eggja hvørji aðrari á longu ferðini.

Gæs læra av hvørji aðrari, eru trúfastar, og tær vitja aftur og aftur á sama stað. Tær skapa eina mentan, har endamálið ikki er sjálvt málið, heldur er tað felagsskapurin.

Tær minna okkum á týdningin í at fáa øll við, tí tað er í felagsskapinum, vit finna meining.

***

Tá ið eg byrjaði á miðnámi møtti eg fagurt reyðhærda læraranum Marianne. Hon var frísk, øðrvísi og búði í Syðrugøtu.

Ein dagin kom hon inn í skúlastovuna við einum stakki av bókum, og á bókunum stóð *Dead Poets Society*. Ein av tímunum – helst við íblástri úr bókini – fór hon upp á skúlaborðið, hugdi uppá okkum og segði á góðum enskum: *We must constantly look at things in a different way!*

Tað veldst nevniliga um sjónarhorn, og vit sótu sum negld og hugdu beint uppá hana.

Í bókini møta vit Mr. Keating. Hann ger einki, sum mann plagar. Hann er orkuríkur, vinarligur, provokerandi og irriterandi, tí hann uttan íhald eggjar ungu næmingar sínar at finna sítt egna flog og meginregluna um, at tá ið vit halda okkum vita okkurt, tá at hyggja aftur at tí úr nýggjum sjónarhorni.

Um hann stóð her í dag, hevði hann óivað biðið okkum umhugsa: Hvat hevur týdning? Hvussu ætla tit at ferðast og saman við hvørjum? Fara tit at taka tykkum tíð at bíða eftir tykkum sjálvum og øðrum, so øll fáa møguleika at flúgva og flúgva?

Hann fær ungu orkutíku og opnu næmingarnar eisini at lesa Robert Herrick:

Gather ye rosebuds while ye may,
Old Time is still a-flying;
And this same flower that smiles today
Tomorrow will be dying.

*Carpe Diem!* Brúka dagin. Vit liva einaferð, tí hevur tað týdning, hvussu vit liva.
*Memento mori!* Minst til, at tú skalt doyggja.

***

Saman um tikið! Lívsvindarnir hava sítt egna lív, og tí hevur tað týdning, hvussu vit møta teimum.

*Carpe Diem!*

Um tað so eru tit, pisur, gæs ella Nobel-vinnarar. Við tí óvæntaða í væntu skulu vit sjálvi stýra og møta tí, sum kemur, við dirvi og taka ábyrgd bæði fyri okkum sjálvum og øðrum.

Tíðin á Kambsdali er skjótt var. Komandi árini fara góðu løturnar – sum minnir – bara at gerast vakrari.

Góðu pisur! Eg ynski tykkum góða ferð í vindum úr øllum ættum!

Við aldargomlu heilsanini fari eg eyðmjúkt at takka fyri høvið at hitta tykkum her á tykkara stóra degi. Góðu pisur: Jesus veri við tykkum á ferðini!

Takk fyri!